62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo



# Gongutúrur í Catalonia

**Í septembur 2025 ber til at uppliva Catalonia í Spania á ein heilt annan hátt.**

Vit skipa fyri einum ógloymandi gongutúri, har vit fara at ganga nýggjar leiðir og ferðast á ein hátt, sum gevur okkum møguleika at síggja tað besta, ið Catalonia hevur at bjóða. Vit fara at ganga ígjøgnum hugnaligar, smáar bygdir, víngarðar og njóta vøkru náttúruna. Á túrinum ganga vit í fjølbroyttum landslagi, síggja allar tær vøkru vatnkeldurnar og fara sjálvandi eisini at royna lokalan mat og frískligt vín.

Hetta verður ein ferð fyri allar sansir!
Tú fært eitt innlit í Catalanska mentan, møguleika at hitta vinarlig, lokal fólk – ein uppliving, ið tú seint fert at gloyma. Ein gongutúrur, ið ikki bert tekur teg ígjøgnum Spania, men eisini á tína egnu dreymaferð

Prísur fyri hvønn

úr **kr. 11.995,-**

## Tín ferðaráðgevi



**Guðrun Hansdóttir**

**+298 34 00 00**
**gudrun@62n.fo**







62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo

# Skráin er hendan:

**Dagur 1:**
Koma til Barcelona. Bussur til Camprodon. Gisting og døgurði á Hotel de Camprodon.

**Dagur 2:**
Camprodon dalurin
Gongutúrurin rundan um Camprodon er ein sera vakur túrur. Vit fáa møguleika at síggja fleiri søgulig støð, og fara eisini at vitja bygdirnar Llanars og Abella. Vit ganga ígjøgnum grønar skógir, akrar og framvið Ter-ánna. Á ferðini fer ferðaleiðarin at greiða frá um landslagið, søguna og vit fáa møguleika at hitta tey lokalu.

- Gongutúrur: uml. 10 km
- Tíð: uml. 4 tímar
- Hædd: uml. 350m

**Dagur 3:**
The Century-old oak grove og Mas Llandrius
Túrurin frá Camprodon leiðir okkum til aldargomlu viðarlundina við Mas Llandrius, ið eisini er kend sum Roureda de Can Pascal.
Vit fara at síggja aldargomul og hugfangandi eikitrø, ið seta sín dám á viðarlundina. Á gongutúrinum koma vit framvið ymiskum vatnkeldum, eyðkenda klostrið, Sankta Pæturs klostrið og kapillið the Virgin del Roble.

- Gongutúrur: uml. 10 km
- Tíð: uml. 3-4 tímar
- Hædd: uml. 200m

**Dagur 4:**
Vatnkeldurnar í Camprodon
Camprodon er víðagitin fyri Pyreneafjøllini, sínar vøkru vatnkeldur og tí góða summarhitanum. Vit ganga ígjøgnum Camprodon og uppliva arkitekturin og hoyra ferðaleiðaran greiða frá søguniog samtíð.

- Gongutúrur: uml. 9 km
- Tíð: uml. 3-4 tímar
- Hædd: uml. 275m

**Dagur 5:**
Við bussi til Tossa de Mar, har vit steðga á í býnum Figueres og vitja Dali Savnið. Eftir vitjanina á Dali Savninum hava tit eina fríløtu. Gisting og døgurði í Tossa de Mar.

**Dagur 6:**
Gongutúrur í Tossa de Mar við ferðaleiðara. Gisting og døgurði á hotellinum í Tossa de Mar.

**Dagur 7:**
Gongutúrur við ferðaleiðara í Lloret, har vit eisini vitja Botaniska havan Santa Clotilde. Gisting og døgurði í Tossa de Mar.

**Dagur 8:**
Bussur frá Tossa de Mar til Barcelona. Flúgva til Føroyar.







62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo

# Íroknað prísinum

- Flog til Barcelona t/r
- Øll ferðaavgjød
- Øll ferðafólka avgjøld í Spania
- Gisting:

  *4 nætur á 3* Hotel de Camprodon v/ hálvpensjón í Camprodon**

  *3 nætur á 4* Hotel GHT Sa Riera við hálvari pensjón í Tossa de Mar*
- Vatn og vín er íroknað til alla døguðrarnar.
- Bussur t/r frá flogvøllinum í Barcelona til Camprodon, og somuleiðis til Tossa de Mar og Lloret.
- Atgongumerki til Dalí Savnið í Figueres og Botaniska havan Santa Clotilde í Lloret
- Sandwich til gongutúrarnar hvønn dag
- Ferðaleiðari er við á øllum túrinum, og lokalur ferðaleiðari til gongutúrarnar

** 1 nátt er bert við morgunmati*

Prísur fyri hvønn í dupult kamari

**Kr. 11.995,-** fyri hvønn

Prísur fyri hvønn í einkult kamari

**Kr. 13.590,-** fyri hvønn